## USA hóttir Noreg

Tað hevur vakt ans í Noregi, at amerikanski sendiharrin í Oslo hevur ávarað um, at norska mótstøðan ímóti amerikansku ætlanini at leypa á Irak uttan ST-heimild kann fáa avleiðingar fyri viðurskiftini millum tey bæði londini.

Í einari røðu í Oslo mikukvøldið segði John Doyle Ong, sendiharri, at nógvir norðmenn tykjast halda, at norska mótstøðan ímóti amerikansku krígsætlanini fær ikki nakrar avleiðingar. Men tey mistaka seg, segði sendiharrin og legði afturat, at norska støðan fer at gera viðurskiftini millum USA og Noreg verri, í hvussu er eina tíð.

Norskir diplomatar søgdu í gjár, at orðalagið hjá amerikanska sendiharranum var óvanligt. Tað sama segði Jan Petersen, uttanríkisráðharri, sum tó vísti á, at tað er ikki óvanligt, at amerikanskir sendiharrar siga tað, sum sendiharrar hjá øðrum londum høvdu aftrað seg við at sagt.. Jan Petersen legði afturat, at orðini hjá sendiharranum fara ikki at ávirka støðuna hjá norsku stjórnini í Irak-málinum.

## Burtur við trælahaldi

Einki land innflutti so nógvar trælir úr Afrika sum Brasil, og hóast trælahald varð alment bannað við lóg í 1898, arbeiða framvegis nógv fólk sum trælir í Brasil. Nú verður tað rópt nútímans trælahald. Har norðuri í landinum arbeiða nógv fólk á stórum bóndagørðum. Tey fáa onga løn, og vápnaðir vaktarmenn forða teimum í at rýma. Maturin er oftast avlopið hjá húsfólkinum.

Men nú skal eisini hetta slagið av trælahaldi takast av. Tað sigur Luiz Inacio da Silva, forseti. Hann sigur, at umleið 25.000 fólk í Brasil liva eina tilveru sum trælir ella tí, ið líkist trælahaldi. Hann hevur nú lagt fram eitt lógaruppskot, sum skal gera enda á hesum nútímans trælahaldinum. Uppskotið hjá forsetanum ber millum annað í sær, at tað almenna kann ognartaka bóndagarðar, sum nýta trælir. Síðani skal jørðin latast trælunum.

Munurin á ríkum og fátækum er sera stórur í Brasil. Av teimum 170 milliónunum, sum búgva í landinum, liva 53 milliónir í størsta fátækradømi. Luiz Inacio da Silva, forseti hevur sett sær fyri at broyta hesi viðurskiftini.

## ES verður kanska ikki við

Tað er minni enn so vist, at ES fer at lata pengar til arbeiðið at endurbyggja Irak eftir eitt møguligt amerikanskt álop.

Tað sigur uttanríkiskommiserurin hjá ES, bretin Chris Patten. Í einari røðu í ES-tinginum í Strasbourg fyrradagin segði hann, at eitt amerikanskt álop á Irak uttan stuðul frá ST fer at skaða bæði ST, NATO og sambandið tvørtur um Atlantshavið. Hann ávaraði samstundis USA og segði, at tað ber ikki til at skipa demokrati við kanónum.

- Tekur ST ikki undir við krígnum, verður tað trupult hjá ES at taka lut í arbeiðinum at endurreisa Irak, segði Chris Patten.

## Avrætting útsett

Ætlanin var, at tann 44 ára gamli Delma Banks skuldi avrættast í einum fongsli í amerikanska statinum Texas fyrrakvøldið, men avrættingin varð útsett eftir boðum frá hægstarætti.

Avgerðin hjá hægstarætti kom bert tíggju minuttir, áðrenn Delma Banks skuldi avrættast. Hetta er 16. ferð, at amerikanski hægstirættur hevur útsett ella ógildað eina avrætting.

Delma Banks er dømdur til deyða fyri at hava skotið ein 16 ára gamlan drong fyri meiri enn 20 árum síðani. Verjar hansara hava sagt, at hann fekk ikki eina rætt-vísa viðferð í rættinum, tá málið varð viðgjørt.

# Skotini í Beograd

**Tað, sum serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, mest av øllum stúrdi fyri, hendi mikudagin.**

MORÐ
*Árni Joensen*



*Zoran Djindjic er tann fyrsti evropeiski stjórnarleiðarin, sum er myrdur síðani Palme-morðið.*

Serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, doyði av tveimum skotum mikudagin. Nakað seinni boðaðu myndugleikarnir frá, at ein fyrrverandi løgregluovasti hevði skipað fyri morðinum.

Eygleiðarar eru á einum máli um, at morðið ber týðiliga boð um, at Serbia hevur ikki megnað at ríva seg leyst av arvinum eftir Slobodan Milosevic, hóast hesin situr í varðhaldi hjá krígsbrotsmannadómstólinum í Haag.

Landið er framvegis í tvíningum. Øðrumegin eru tey, sum vilja gera upp við fortíðina, ta víðgongdu tjóðskaparrørsluna og krígsbrotsverkini, so landið kann fáa viðurkenning sum partur av altjóða samfelagnum. Hinumegin eru tey, sum tvíhalda um, at serbar hava altíð rætt, at Slobodan Milosevic eigur ikki at sita í varðhaldi í Haag, tí hann hevur einki skeivt gjørt, og at tað er neyðugt at endurreisa tað gamla, sama hvat tað kostar.

Seinastu tíðina hava útlit verið til, at tann fyrri parturin fór at vinna hetta stríðið. Hetta var tann vongurin, sum Zoran Djindjic var partur av, og sum gekk á odda í kravgongunum, sum noyddu Milosevic frá.

Sum forsætisráðharri legði hann dent á at fáa góð viðurskifti við Vesturheimin, og sum lið í hesum játtaði hann at arbeiða saman við krígsbrotsmannadómstólinum í Haag. Tað var eisini hann, sum tók ta endaligu avgerðina um at útflýggja Milosevic. Herfyri lovaði hann at finna tann eftirlýsta generalin Ratko Mladic, so eisini hann kann sendast til Haag.

Eygleiðarar siga, at Vesturheimurin vísti Serbia stóra vælvild, tá tað ráddi um at fáa Milosevic til Haag, men síðani er vesturlendski áhugin fyri landinum minkaður nógv. Sjálvur skal Zoran Djindjic hava sagt, at hann kendi tað, sum at altjóða samfelagið hevði gloymt Serbia, og at landið tí ikki fekk tann stuðul, sum var neyðugur fyri at benda tí á eina demokratiska kós.

Skotini í Beograd fyrradagin avdúkaðu, at altjóða samfelagið lurtaði ikki eftir Zoran Djindjic, siga eygleiðararnir.

# 15 ára gomul burturflutt í níggju mánaðir

**Tann 15 ára gamla Elizabeth Smart varð burturflutt úr kamari sínum í juni í fjør. Mikudagin varð hon funnin aftur á lívi.**

BURTURFLYTING
*Árni Joensen*


*Elizabeth Smart varð burturflutt í juni í fjør. Mikudagin kom hon afturíaftur.*

Eina náttina í juni í fjør breyt ein maður inn í eitt kamar í einum húsum í amerikanska býnum Salt Lake City og burturflutti eina 15 ára gamla gentu, sum lá og svav. Maðurin var vápnaður.

Burturflytingin skakaði alt USA, og hóast vælmannað løgreglulið leitaðu allastaðni í býnum og har um vegir, var gentan ikki at finna.

Mikudagin boðaði løgreglan í býnum Sandy frá, at hon hevði tikið ein mann og tvær kvinnur, og at onnur kvinnan var tann 15 ára gamla Elizabeth Smart úr Salt Lake City.

Tað vísti seg, at burturflytarin var ein maður, sum hevði arbeitt hjá hjúnunum Smart fyrr. Tey, sum kenna mannin, siga, at hann heldur seg vera profet, og at hann virkar sum eitt slag av einum presti millum fólk, sum búgva í tjaldi uppi í fjøllunum.

Í gjár dugdi løgreglan ikki at siga , hví maðurin burturflutti ta 15 ára gomlu gentuna, ella hvar hann og konan hava fjalt hana síðani seinasta summar.



# Vit hava tað gott í Føroyum


*Kamala Langgaard flutti til Føroyar frá Sri Lanka fyri 16 árum síðani. – Tað er gott at búgva í Føroyum, og eg trívist væl, sigur hon*

**– Føroyar eru eitt luksusland samanborið við Sri Lanka. Tað er púra vist, sigur Kamala Langgaard, sum flutti til Føroyar fyri 16 árum síðani. Hon trívist væl í Føroyum, og sjálv sær hon seg sum ein føroying í dag**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Lukturin av máling kemur í nasaborarnar beint sum ein kemur inn í gongina. Kamala stendur í køkinum og stákast. Hon orsakar óruddið, sum ikki á nakran hátt er sjónligt og sigur, at tey júst hava málað, og tí hevur hon ikki fingið alt upp á pláss aftur.

Inni í stovuni eru veggirnir heilt ljósir, og hetta heimið ber ikki brá av, at nakar útlendingur húsast har.

– Eg eri so føroysk, sum eg kann vera, sigur Kamala. Hon hevur ikki nógv frá Sri Lanka í heiminum, men tað er ongin ivi um, at hon kennir sínar røtur kortini, tí meðan prátið gongur, er tað sera týðuligt, at Kamala, hóast hon hevur búð í Føroyum í 16 ár, hevur nógva virðing fyri siðum og liviháttum á Sri Lanka.

Hon hevur verið á Sri Lanka einar fýra ella fimm ferðir, síðani hon sum 19 ára gomul flutti haðani.

– Eg síggi tað betur og betur hvørja ferð eg eri har, hvussu gott vit hava tað her í Føroyum. Londini eru so ymisk, tey kunnu ikki samanlíknast á nakran hátt. Men tó eru familjubond eins sterk í báðum støðum, greiðir hon frá.

Kamala er gift við Óla Langgaard, sum hon hitti á Sri Lanka miðskeiðis í áttati árunum, tá hann var og ferðaðist har. Tey blivu góð og giftust í oktobur 1987. Óli gjørdi greitt beinanvegin, at hann ikki ynskti at búgva á Sri Lanka.

– Um eg skuldi hava Óla, so mátti eg so flyta, men tað var sanniliga ikki bara sum at siga tað, sigur Kamala, sum dugir avbera væl at tosa føroyskt.

Tað var sera torført hjá henni at sleppa inn í landið. Tey royndu fleiri ferðir frá Sri Lanka, so at tey kundu fylgjast heim, men endin var, at Óli fór heim áðrenn, og fekk so viðurskiftini í rættlag úr Danmark, soleiðis at Kamala kundi flyta til Føroyar í desembur 1987.

Hon minnist flennandi aftur á, at tá hon kom til Føroyar var nógvur kavi. Hon hevði ikki sæð kava áður, og tey búðu langt uppi í Klaksvík, so tað var torført hjá henni at venja seg við.

– Ta fyrstu tíðina tosaði eg ikki um annað, enn at sleppa heimaftur til Sri Lanka.

Heima var mamman einsamøll við børnunum, tí pápin var deyður. Pengar vóru ikki nógvir av, og til dømis hevði hon onga telefon, so um Kamala vildi tosa við mammu sína, so noyddist hon at ringja til onnur fólk og fáa tey at seta seg í samband við mammuna, og so mátti hon ringja uppaftur. Men í dag hevur mamman telefon, so nú tosar Kamala ofta heim. Á Sri Lanka tosa tey egið mál: Sinhalesiskt. Tað er ógjørligt fyri ein, sum ikki kennir tað bara at lesa tað, tí tað eru heilt øðrvísi bókstavir enn okkara.

Tað gingu tríggir mánaðir, áðrenn hon fekk arbeiðsloyvið, og tað var tískil ein drúgv tíð hjá henni, tí tá kom hon ikki nógv út og ikki í samband við nógv fólk.

– Á Sri Lanka fer ein kvinna ikki einsamøll út eftir klokkan seks á kvøldi, tí tað er nógvur kriminalitetur og tískil vandamikið. Og tá ein ikki er von við nakað annað, so tordi eg ikki út einsamøll her. Eg kendi jú ongan, greiðir hon frá.

Men tað bleiv alt betur, tá hon fekk arbeiði. Maðurin saman við fleiri áttu eitt matvøruvirki, og har byrjaði hon at arbeiða í 1988.

### Livir sum føroyingur

Kamala hevur allatíðina roynt at liva seg inn í føroysk viðurskifti. Og tað hevur eydnast henni til fulnar. Hon trívist væl her og hevur funnið seg sjálva í Føroyum. Hon sigur, at hon hevði ikki kunnað hugsað sær at flutt aftur til Sri Lanka at búð.

– Tað hevði eg ikki kunnað, sjálvandi í eina tíð møguliga, men ikki restina av lívinum. Tí nú havi eg vant meg við at liva sum føroyingur, og so hevði tað verið ómetaliga torført hjá mær at flutt aftur, sigur Kamala, sum flutti aftur til Klaksvíkar fyri tveimum árum síðani eftir at hava búð í Kunoy í nærum tíggju ár.

Hon heldur eisini, at nógv er broytt á Sri Lanka, síðani hon flutti. Har hevur verið sera ófriðarligt, men beint nú er so nøkulunda friðarligt.

– Kvinnur arbeiða, til tær giftast, so ganga tær heima fyri rest, og tað hevði eg óivað eisini gjørt, um eg ikki flutti, sigur Kamala, sum tó ongantíð hevði nakað ynski um at sleppa burtur, áðrenn hon hitti Óla.

Kamala greiðir frá, at tað í dag er munandi lættari at sleppa inn til Føroyar enn tað var, tá hon flutti. Hóast hon og Óli vóru gift, so var tað ikki bara sum at siga tað. Kamala hevur seks systkin, og tey hava ofta roynt at fingið onkran av teimum heim til Føroyar at vitja. Einaferð skuldi ein systur koma, men ikki fyrr enn myndugleikarnir í Danmark høvdu fingið eina váttan úr Dubai, at hon fór at verða aftur til arbeiðis í Dubai ein mánaða seinni, slapp hon inn. Og tað var bert til at ferðast.

Í dag er tað munandi lættari. Beiggi Kamalu kom til Føroyar fyri hálvum øðrum mánaði síðani, og hann hevur fingið arbeiðsloyvi í eitt ár.

Beiggi hennara hevur havt eitt sindur ilt við at venja seg við, hvussu frítt tað er í Føroyum. Hann er framvegis eitt sindur ørkymlaður, tá Kamala fer út um kvøldið, tí hann er ikki vanur við, at kvinnur fara einsamallar út. Men so roynir Kamala at greiða honum frá, at tað er púra vanligt í Føroyum.

– Hann hevur ikki verið her so longi enn, og hann má fáa tíð til at venja seg við alt, sigur hon og smílist. Hóast hon livir sum ein annar føroyingur millum føroyingar, so hevur hon eitt ynski um at kunnað farið við dóttrini og øðrum ungum eisini til Sri Lanka eftir fólkaskúlan, so tey møguliga kundi roynt at arbeitt har í einar tríggjar mánaðir.

– So høvdu tey kunnað sæð, hvussu fátækrasligt tað er í støðum á Sri Lanka, og hvussu gott vit hava tað her í Føroyum, sigur Kamala.

Til tíðir kann tað tykjast sum Kamalu longist aftur til Sri Lanka, men tað er ongin ivi um, at hon er komin til Føroya fyri at verða.

– Her búgvi eg, eg havi mítt lív og mína familju her.